


# Opið hús hjá Auto Service

LÝSINGARTILFAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í sambandi við at nýggi Opel Astra er komin til landið, verður opið hús hjá Auto Service leygardagin 9. januar frá 10 til 16.

Opel Astra er ein heilt nýggjur bilur, sum fær sera góð ummæli frá evropeiskum motorjournalistum, bæði hvat designi og koyrieginleikum viðvíkur.

Í sambandi við at bilurin verður presenteraður verða poppkorn og cola at fáa, og tey sum royndarkoyra bilin verða við í eini kapping har møguleiki er at vinna eina fartelefon ella eina fløguboks við trimum Ocean´s eleven filmum, sigur Heðin Weihe, sølumaður hjá Auto Service.




*Nýggi Opel Astra*

## Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05

Í sendingini er m.a. prát við Eivind av Reyni frá Reyni Service um Toyota, sum bleiv mest selda bilmerki í 2009. Eisini verður vitjað á Vøruhúsinum á Hjalla, har m.a. verður prátað við Sámal Olsen og við Sofus Hansen, sum luttók á einum skeiði fyri lakkerarar.

Í sambandi við at nýggi Opel Astra verður presenteraður leygardagin, verður ein samrøða við Heðin Weihe, sølumann hjá Auto Service. Eisini verður ein Citröen C1 elbilur hjá Elfelagnum SEV royndarkoyrdur.

# Green Van of the Year 2009




*Iveco Daily við 3.0 litra natúrgassdrivnum motori er kosin "Green Van of the Year 2009"*

Iveco Daily við 3.0 litra natúrgassdrivnum motori er kosin "Green Van of the Year 2009" í eini kategori fyri bilar við alternativum brennievni á "Fleet Van Awards", sum herfyri varð hildin í London. Hesin Iveco Daily við 136 hk og snúningsmomenti upp á 350 Nm dálkar 62 prosent minni enn ein tilsvarandi útgáva við dieselmotori.

**mg**

## Allir Kia sjey ára garanti




*KIA Sorento 2010*

KIA Motors Europe byrja nýggja árið við at geva 7 ára garanti upp á allar nýggjar KIA bilar í Evropa, eins og teir hava gjørt við Kia Ceed síðan 2006. Talan er um allar Kia frá tí minsta Kia Picanto til tann nýggja stóra KIA Sorento.

**mg**




*Toyota varð mest seldi bilur í Føroyum í 2009*

# Toyota mest seldi bilur

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggjastu hagtølini hjá Akstovuni vísa at samlaða sølan av nýggjum akførum er minkað við næstan 46 prosentum.

Sølan av nýggjum persónbilum í Føroyum í ár er nógv minkað í mun til í fjør. Í fjør vóru seldir 1240 persónbilar í mun til 693 í 2009. Ein minking upp á 44 prosent. Sølan av vørubilum er minkað frá 289 í 2008 til einans 92 í 2009. Ein minking upp á heili 68 prosent.

Mest selda bilmerkið er Toyota við 121 bilum, nummar tvey er Citroen við 114 og nummar trý er Ford við 94 bilum.

# SEV royndarkoyrir elbilar

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fyri jól komu tríggir Citröen C1 EVie elbilar, sum Elfelagið SEV hevur leigað til royndarkoyring í Føroyum.

Citröen C1 EVie er ein vanligur Citröen C1, sum er umbygdur til elbil í Danmark. Elmotorurin er upp á 30 kw ella 51 hk, og bilarnir kunnu koyra millum 80 og 100 km upp á eina løðing.

Starvsfólk hjá SEV hava royndarkoyrt bilarnar um høgtíðina. Ætlanin er, at bilarnir skulu royndarkoyrast av einstaklingum, fyritøkum og stovnum fyrstu tríggjar mánaðirnar í nýggja árinum.



*Teir tríggir Citröen C1 elbilarnir sum SEV hevur leigað til royndarkoyring í Føroyum*